# Fer at raka einar 250-300 sjúklingar

*Tveir fysioterapeutar eru sagdir upp á Suðuroyar Sjúkrahúsið og tað er ein vanlukka fyri sjúk og brekað í Suðuroynni, tí nú má nógvviðgerð halda uppat*

ÁKI BERTHOLDSEN

–Verða tær ætlaðu sparingarnar settar í verk, fer tað at raka einar 250-300 sjúklingar um árið.

So einføld er støðan á Suðuroyar Sjúkrhúsi.

Seinastu tíðina hevur nógv verið frammi um, at sjúkrahúsini eru so illa sperd av peninganeyð, at tað fer at fáa avleiðingar fyri sjúklingarnar.

Eisini á Suðuroyar Sjúkrahúsi hava tey leingi gjørt vart við, at kemur ikki broyting í, fer tað at fáa álvarsligar avleiðingar fyri sjúklingarnar.

Serliga stúra tey fyri teimum sparingum, sum eru gjørdar í fysioterapiini á sjúkrahúsinum.

Tveir fysioterapeutar eru sagdir úr starvi, men fyribils arbeiða teir í uppsagnartíðini.

Og á sjúkrahúsinum seta tey nú sítt álit á, at løgtingið samtykkir at játta sjúkrahúsinum meiri pening, nú uppskotið um eykajáttanarlógin kemur til viðgerðar.

Helst fáa vit longu í dag eina ábending um, hvar suðuroyingar flóta, tí eftir ætlan byrjar viðgerðin av eykajáttanarlógini í dag.



*Aftaná, at Suðuroyar Sjúkrahús var útbygt fyri nøkrum árum síðani, vóru tað mong sumfegnaðist um tær góðu umstøðurnar, sum sjúklingarnir, ið høvdu fysioterapi fyri neyðini, høvdu fingið, eitt nú við tí heita hylinum. Men nú er ov lítið av peningi til at fáa fulla nyttu burturúr íløguni*

Og John Rødgaard, leiðandi fysioterapeutur sigur, at endar viðgerðin við, at sjúkrahúsið ikki fær meiri pening, fara teir báðir uppsagdu fysioterapeutarnir úr starvi beinanvegin.

Annars er uppsagnartíðin ikki av fyrrenn 30. juni.

**Fer at raka sera meint**

Og John Rødgaard ger heilt greitt, at verður hetta úrslitið, fer tað at raka suðuroyingar sera meint.

– Tann beinleiðis avleiðingin av hesum, er, at øll tann ambulanta viðgerðin fer at halda uppat.

Hann sigur, at tann fysioterapeutiska viðgerðin kann býtast sundur í tríggjar høvuðsbólkar.

Í fyrsta lagi er talan um at viðgera teir sjúklingar, sum eru innlagdir á sjúkrahúsinum.

Í øðrum lagi er talan um at viðgerða og at halda við líka, tey, sum búgva á ellis og røktarheiminum

Og í triðja lagi er talan um ambulantar viðgerðir.

Á Sjúkrahúsinum eru tilsamans fimm fysioterapeutar.

Leiðslan á Suðuroyar Sjúkrahúsi sigur, at tríggir av teimum arbeiða fulla tíð, og hinir báðir arbeiða 0,7 tíð í part.

Sostatt hevur tilsamans verið talan um 4,4 fulltíðarstørv.

Men nú, tveir fulltíðarsettir fysioterapeutar eru sagdir upp, eru sostatt bara 2,4 størv eftir.

– Og skulu vit, sum eftir eru, gera okkara arbeiðið til lítar, er tað einasti møguleikin at leggja tað ambulantu viðgerðina niður, sigur John Rødgaard.

–Er tað framvegis ætlanin at tryggja førleikan hjá teimum, sum eru innløgd á sjúkrahúsinum og at varðveita lívisvirðið hjá teimum, sum búgva á ellis- og røktarheiminum, er tað óhugsandi at skerja viðgerðina har.

– Í hesum báðum førum er talan arbeiðsuppgávur, ið ikki kunnu skerjast, um ætlanin er at varðveita sjúkrahúsi- og ellisheimið, leggur hann afturat.

**250-300 sjúklingar**

Leiðandi fysioterapeuturin sigur, at í sambandi við tær ambulantu viðgerðirnar, er m.a talan um at venja og viðgerða tey, sum eru útskrivað av sjúkrahúsinum.

Talan kann eitt nú verða um fólk við brotnum limum, ella um fólk, sum eru lamin av blóðtøppi í heilanum.

–Somuleiðis er talan um fólk, sum kommunulæknarnir senda til okkara til venjingar, av tí at tey, hava ymiskt at dragast við, eitt nú gikt, onnur kropslig brek, ella talan kann vera um ringan rygg, høvuðpínu, eins og talan er um børn við ymsum rørslubrekum.

–Kommunulæknarnir ávísa sjúklingar til sjúkrahúsið av tí at teir báðir privatu fysioterapeutarnir rætt og slætt ikki hava orku til at átaka sær sjúklingarnar.

Sum lógin nú er, forðar hon eisini fyri, at fleiri fysioterapeutar kunnu byrja.

– Men sjálvsagt verða sjúklingar eisini vístir til ambulanta viðgerð á sjúkrahúsinum, tí sjúkrahúsið hevur nógv betri umstøður enn teir privatu fysioterapeutarnir hava, eitt nú hyl við heitum vatni og eina vælútgjørda venjingarhøll.

John Rødgaard sigur, at taka vit 1999 sum dømi, verður talan um 263 sjúklingar sum tað rakar, um tey noyðast at niðurleggja tað ambulantu viðgerðina.

–Bara í ár fara einir 100 sjúklingar at missa tað ambulantu viðgerðina, um vit siga, at tann ambulanta viðgerðin verður niðurløgd frá 1. juli, tá ið uppsagnartíðin hjá teimum báðum uppsøgdu fysioterapeutunum er úti.

Men hann vísir enn einaferð á, at endar viðgerðin í tinginum við, at sjúkrahúsið ikki fær meiri pening, fara teir úr starvi beinanvegin, og so fer tað at raka enn fleiri sjúklingar í ár, sigur John Rødgaard.

# Átala at trygdin verður sett í vanda



*Foreldur at børnum í Hoyvíkar Skúla hava stóran ampa av støðuni og mánakvøldið høvdu tey fund um støðuna. Við pultin situr formaðurin, Thordur Thorsteinsson.*

ÁKI BERTHOLDSEN

– Hetta er ein ótolandi støða hjá okkum foreldrum, tí nú verða børnini ikki ansa ein stóran part av degnum.

Foreldrafelagið í Hoyvíkar Skúla hevur ikki ligið á latu síðuni, síðani lærararnir løgdu arbeiðið niður mitt í farnu viku.

Og nú hava tey eisini vent sær til sjálvan landsstýrismannin í skúlamálum, Signar á Brúnni, við eini áheitan um, at hann fær greiði á støðuni.

Støðan er ótolandi fyri okkum foreldur, og vit átala at trygdin hjá børnunum verður seg í vanda av hesi ósemjuni ímillum lærararnar og myndugleikarnar, siga foreldrini.

Hoyvíkar skúli er eina harðast raktur av arbeiðssteðginum, tí har eru heilir 14 av teimum 24 lærararunum í verkfalli.

Av tí sama eru tað teir fægstu tímarnir, sum yvirhøvur verða lisnir so leingi arbeiðssteðgurin stendur við.

Foreldrini greiða landsstýrismanninum frá, at tey hava fingið at vita frá skúlanum, at skúlin sær seg ikki føran fyri at hava ábyrgdina av børnunum, teir tímarnar, tey hava frí av tí at lærarin er í verkfalli.

Sostatt verða børnini ikki ansað ein stóran part av degnum og tað kunnu foreldrini ikki góðtaka.

Í brævinum til Signar á Brúnni vísa tey til lógina sum sigur, at øll børn hava undirvísingarskyldu.

Men so minna tey eisini landsstýrismannin á eina aðra grein í somu lóg, sum sigur, at tað landsstýrismaðurin í undirvísingar- og mentamálum, also í løtuni Signar á Brúnni, sum hevur tað yvirskipaðu leiðsluna og skal ansa eftir, at galdandi reglur verða hildnar.

– Tessvegna vil foreldraráðið í Hoyvíkar Skúla heita á landsstýrismannin í undirvísingar og mentamálum at greiða trupulleikan, soleiðis at skipað verður fyri, at børnini kunnu fara í skúla undir tryggum umstøðum, sigur foreldraráðið í brævinum til landsstýrismannin.

Thordur Thorsteinsson, formaður í foreldraráðnum, sigur, at ábyrgdin hjá Signari á Brúnni er púra greið og tað einasta tey biðja hann um, er, at hann livir upp til sína ábyrgd

Annars sigur Thordur Thorsteinsson, at foreldrini hava so stóran ampa av støðuni, at alt fleiri og fleiri lata børnini verða heima, tí tey tora ikki at lata tey fara í skúla undir so ótryggum umstøðum.

–Í flokkunum eru ímillum 20 og 25 børn, men í fleiri flokkum er undir 10 børn í skúla í løtuni, og í onkrum føri hava bara sjey børn verið í skúla.

—Foreldur ringja hvønn dag at gera vart við sín ótryggleika og at spyrja, hvørji rættindi og skyldur tey hava, men vit kunnu bara lata tað standa til tey sjálvi at gera av, antin tey senda børnini í skúla, ella ikki, hóast børnini í grundregluni hava undirvísingarskyldu.



# Hini hava ikki rørt seg

*Forkvinnan í Føroya Lærarafelag metir avgørt, at í ósemjuni millum felagið og Fíggjarmálastýrið, liggur bólturin hjá Fíggjarmálastýrinum*



*Frá úrslitaleysu samráðingunum millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið. Lærarar, ið eru tænastumenn, kunnu koma fyri løgtingið, har lønin kann ásetast, men sáttmálasettir lærarar skulu hava løn eftir sáttmála.*
***Mynd: Jens Kristian Vang***

DAGFINN OLSEN

Elsa Birgitta Petersen, forkvinna í Føroya Lærarafelag, er ivaleys í, at í ósemjuni millum felagið og Fíggjarmálastýrið, ið hevur ført til arbeiðssteðg, eigur Fíggjarmálastýrið næsta leikin.

Hetta grundgevir hon við, at undir samráðingunum millum partarnar hevur Føroya Lærarafelag slakað nógv, meðan mótparturin ikki hevur rørt seg.

Fíggjarmálaráðharrin, Karsten Hansen, er millum teirra, ið skulu niður til Danmarkar í morgin at samráðast við donsku stjórnina um ríkisrættarligu støðu Føroya. Sostatt kann væntast, at neyvan hendir nakað í málinum millum Fíggjarmálastýrið og Føroya Lærarafelag fyribils.

**Tænastumenn í løgtingið**

Elsa Birgitta Petersen sigur seg ikki vita nakað um, at Fíggjarmálastýrið hevur nakrar ætlanir um, at partarnir skulu koma saman aftur.

Í tíðidaskrivi vísir felagið á, at Tummas Magnussen frá lønardeildini í Fíggjarmálastýrinum hevur sagt felagnum, at har gera tey einki við málið.

Tað sum kann henda er, at lærarar, ið eru tænastumenn, koma fyri løgtingið, tí teir arbeiða eftir eini lóg.

Elsa Birgitta Petersen vísir á, at tað er einaferð áður komið fyri, at tænastumannaløn er ásett við lóg. Tað hendi síðst í fimmtiárunum.

Elsa Birgitta Petersen vísir tó á, at sáttmálasettu lærararnir skulu hava løn eftir sáttmála.

Meðan arbeiðssteðgur er, er tað Føroya Lærarafelag, ið skal gjalda limum sínum løn. Júst hvussu hetta fer fram og hvør lønin er, vil felagið tó ikki upplýsa.

**Opið hús**

Í gjár hevði Føroya Lærarafelag opið hús fyri limum sínum. Elsa Birgitta Petersen sigur, at slík tiltøk hava til endamáls at fáa limirnar á tal og skapa sosialt netverk.

Tað eydnaðist ikki at fáa viðmerking frá Karsten Hansen í gjár.

## Fylgið við á netinum

**Hjá teimum, ið hava atgongd til alnetið, er gjørligt at fylgja við gongdini í málinum um arbeiðssteðgin hjá Føroya Lærarafelag og ósemjuna millum felagið og Fíggjarmálastýrið.**

**Lønardeildin hjá Fíggjarmálastýrinum hevur á heimasíðu síni kunnandi tilfar. Henda heimasíða eitur www.lnd.fo**

**Á heimasíðuni hjá Føroya Lærarafelag kann ein trýsta á ein knøtt, ið kallast kunning. Tá koma tíðindi fram, t.d. tíðindaskriv frá felagnum og samhugabrøv, ið eru send felagnum, ið nú er í sínum fyrsta arbeiðssteðgi.**

**Heimasíðan hjá Føroya Lærarafelag eitur www.lararafelag.fo**

## Kirkjan á netinum

Fólkakirkjan er nú komin nærri fólkinum. Í hvussu er teimum, ið hava atgongd til alnetið.

Fólkakirkjan hevur egna heimasíðu, ið ein kann trýsta seg inn á við at skriva www.folkakirkjan.fo

Fram kemur mynd av múrinum í Kirkjubø og so kann farast víðari at fá upplýsingar um t.d. kirkjur, kirkjuráð, prestagjøld, guðstænastur og hjá teimum, ið skulu navngeva nýggjum limum í familjuni, er gaman í at trýsta seg inn á navnalistan.

Um stutta tíð verður eisini møguligt at lesa Bíbliuna, um ein vitjar heimasíðuna.




## Fakta

* Tann 6. mars 2000 fara Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið til samráðingar saman við semingsmonnum. Samráðst verður, til báðir partar á kvøldi tann 7. mars gera av, at teir taka ikki við semingsuppskotinum hjá semingsmonnunum.

* Lærarafelagið hevur undir samráðingunum hótt við at gera álvara av at nýta nýggja verkfallsrættin, sum sáttmálasettu lærararnir hava. Tann 8. mars er arbeiðssteðgur.

* Talan er ikki um verkfall, men arbeiðssteðg, tí hvørgin parturin tók við semingsuppskotinum. Sáttmálasettu lærararnir telja 1/3 av limum Føroya Lærarafelags. Umleið 240 í tali.

* Í dag, tann 15. mars, hava sáttmálasettu lærararnir verið við hús í eina viku. Einki samband hevur verið millum partarnar, síðani 7. mars.

* Karsten Hansen, fíggjarmálaráðharri, vil ikki lata Lærarafelagnum meira enn tey 6,5%, ið onnur feløg hava fingið

* Føroya Lærarafelag sigur seg ikki vilja hava meira í lønarhækkan, enn tey 6,5 %. Men felagið vil hava, at lærarar fáa stundir at gera eyka arbeiðið, sum nýggja fólkaskúlalógin leggur á teir. T.v.s. niðursett tal av undirvísingartímum, so tíð er til fyrireiking og ráðlegging hjá lærarum og hjá skúlaleiðslum til umsiting.

* Niðursett undirvísingartímatal merkir, at tørvur verður á fleiri lærarum møguliga merkir hetta eini 50 nýggj lærarastørv.